

*Jan Hentze, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, við einum Peugeot 206 SW 2.0 HDi XS*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Peugeot 206 - bestseljari í Danmark og Evropa

**Peugeot 206 hevur verið ein succes síðan bilurin kom á marknaðin. Síðan 1998 eru framleiddir yvir tvær milliónir av Peugeot 206, sum í 2002 varð mest seldi bilur í Danmark**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Peugeot 206 var ein lítil kollvelting, tá hann kom á marknaðin.

Bilurin hevði smart design, og góðar franskar koyrieginleikar. 206 bleiv sera væl móttikin, og hevur hann verið ein av mest seldu bilum í Evropa. Peugeot 206 verður gjørdur í fleiri útgávum við trimum og fimm hurðum, sum stationcar (206 SW) og sum 206 CC (coupé og cabriolet). Eisini er fleiri bensin og HDI dieselmotorar at velja í millum.

Fleiri av nýggju modellunum hava nú klárar forlyktir og lakkeraðar kúfangarar. Innan eru eisini fleiri broytingar við t.d. instrumentborðinum.

## Peugeot 206 SW 2.0 HDi XS

Motorurin:
2.0 litur 4 syl.
diesel við 90 hk

0-100 km/t:
13,5 sek

Oljunýtsla:
18,9 km/l

Dekkstødd:
195/55-15

Stødd og vekt
Longd:
402,8 cm
Breidd:
165,2 cm
Hædd:
146,0 cm
Eginvekt:
1100 kg
Viðførisrúm:
313 litrar

Prísur:
kr. 178.000

Søluumboð
P/F Meinhardt Arge
v. Oyggjarvegin
FO-110 Tórshav
Tel.345400

www.bilarge.fo

# Primera - brýtur við alla vanahugsan

**Nýggi Nissan Primera, ið kom á marknaðin í fjør, brýtur við alla vanahugsan um hvussu ein Primera eigur at síggja út. Bilurin er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform og er nakað størri enn forgangarin**




*Páll Danielsen, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, við einum nýggjum Nissan Primera*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Við nýggja Primera hevur Nissan verksmiðjan gjørt alt fyri at sameina sportligar og komfortablar koyrieginleikar í einum elegantum bili. Bæði innan og uttan er nýggi Primera ein smartur bilur.

Sum nakað nýtt eru instrumentini í miðjuni á instrumentborðinum,og allar funktiónir eru í eini konsoll í miðjuni. Primera fæst í útgávunum: Visio, Acenta og Tekna. Tríggir bensinmotorar eru at velja í millum: 1,6 litur við 109 hk, 1,8 litur við 116 hk og 2,0 litur við 140 hk og ein 2,2 litur common-rail dieselmotorur við 126 hk. Primera kann t.d. leverast við fartpiloti, sum altíð heldur røttu frástøðuna til bilin sum koyrir frammanfyri. Bilurin kann eisini leverast við trinleysum CVT automatgirum har eisini ber til at skifta manuelt. Primera verður gjørdur sum sedan, hatchback og stationcar.





*Nýggi Opel Meriva kemur á føryska marknaðin seinast í mai ella fyrst í junimánaði*

# Opel Meriva við genialum FlexSpace systemi

**Ein heilt nýggjur Opel Meriva kemur nú á marknaðin og verður her hjá okkum í mai. Bilurin er er gjørdur við Opel Zafira sum fyrimynd. Meriva er sera rúmligur bilur við einum FlexSpace systemi har nógvir møguleikar eru fyri innrætting**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Við »FlexSpace« systeminum er Opel Meriva ein bilur við heilt nýggjum møguleikum fyri innrætting.

Meriva er genialt innrættaður, t. d. er baksetrið deilt í trý, soleiðis at t. d. mittasta setrið kann takast úr bilinum, síðan kunnu tey uttaru setrini flytast inn móti hvørjum øðrum og flytast aftur ella fram.

Møguleiki er eisini fyri at velja ímillum gott beinpláss á baksetrinum ella stórt viðførisrúm.

Um øll trý baksetrini verða løgd framyvir og løgd saman, verður gólvflatan 170,0 cm. Hetta eru bert nakrir av møguleikunum við innrættan av Meriva við FlexSpace systeminum.

Bilurin fæst við fimm ymiskum motorum, tveimum 1,6 litur bensinmotorum við ávikavist 87 og 100 hk og einum 1,8 litur bensinmotori við 125 hk og tveimum 1,7 litur dieselmotorum við ávikavist 75 og 100 hk.

Meriva fæst við hópin av eykaútgerð sum t.d. »Twin Audio«, har tey á baksetrinum við høvuðtelefonum kunnu lurta eftir einum øðrum programmi enn tey á forsetrinum.

Bilurin fæst eisini við Xenon forlyktum, aircondition, leðurinntrekki og alu-felgum. Eisini kann bilurin leverast soeiðis, at hann hevur tvey sóltak. Meriva verður gjørdur í Zaragoza í Spania.

## Opel Meriva 1,6 16V

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl.16V við100 hk ECOTEC bensinmotorur |
| 0-100 km/t | 13,3 sek |
| Bensinnýtsla | 13,3 km/l |
| Dekkstødd | 185/60-15 |
| Longd | 404,2 cm |
| Breidd | 169,4 cm |
| Hædd | 162,4 cm |
| Viðførisrúm | 491 litrar |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge<br>v.Oyggjarvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.bilarge.fo |







